# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio á Rás2**
*Bilradio verður sent hósdag kl. 16.05, fríggjadag kl. 8.00 og leygardag kl. 13.*

# Harley-Davidson V-Rod Muscle



*Harley-Davidson VRSCF V-Rod Muscle við 1250 ccm Revolution-motori*



*Baklyktirnar eru bygdar inn í bakskermin, og nummarplátan er á síðuni*

**Í kappingini um evropeisku motorsúkklukundarnar eru Harley Davidson komnir á marknaðin við V-Rod Muscle, sum er ein nýggj og meira sermerkt útgáva av tí kendu Harley Davidson V-Rod**

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggjasta modellið hjá Harley-Davidson er hendan VRSCF V-Rod Muscle við 1250 ccm Revolution-motori, sum Porsche Engineering í Týsklandi hava verið við til at designa við støði í 1100 V-Rod motorinum.

Talan er um eina motorsúkklu við tveimum sylindarum og V-motori, sum nú hevur fingið enn meira hestakreftir og størri snúningsmoment. Motorurin er upp á 1250 cc og gevur súkkluni ta kraftina, sum skal til fyri at kunna nýta koyrieginleikarnar fult út. Ljóðið frá útstoytinum er eisini sum á eini rættari Harley.

Harley-Davidson hava við hesi súkkluni gjørt eina nútímans »sportstourer« við øllum tí sum hoyrir til eina ordiliga Harley. Designið aftan verður kallað »clipped and clean rear end«, har baklyktirnar eru bygdar inn í bakskermin, og nummarplátan er ikki mitt fyri aftan sum vanligt, men á síðuni - í besta customstíli. Stórur dentur er lagdur á, at súkklan skal vera viðlíkahaldsfrí, tí er langt millum eftirlitini.

Heimskenda amerikanska Harley Davidson motorsúkkluverksmiðjan, ið er yvir 100 ára gomul, varð stovnað av Bill Harley og Arthur Davidson í Milwaukee í Wisconsin í USA í 1903. Harley Davidson vórðu millum tær fyrstu hópframleiddu motorsúkklurnar í heiminum.

Tað er Riders.fo í Jónas Broncksgøtu 33 í Havn, sum selur Harley Davidson motorsúkklurnar í Føroyum. V-Rod Muscle kostar kr. 247.479,- Meira fæst at vita á heimasíðuni: www.HD.fo



*Ljóðið frá útstoytinum er sum á eini rættari Harley*

# Danir keypa 30 Ferrari um árið

Sølan av italienskum Ferrari sportbilunum í Danmark er tvífaldað seinastu fimm árini.

Fyri fimm árum síðan vórðu seldir umleið 15 Ferrari um árið, meðan talið nú um 30 bilar.

Vit hava havt ein vøkstur upp á millum 10 og 20 prosent seinastu árini, siger Theis Gronemann, marknaðarstjóri hjá danska Ferrari importørinum, Formula Automobile, við tíðindastovuna Newspaq.

Bíligasti Ferrari F 430 kann keypast í Danmark fyri umleið fýra milliónir krónur, meðan tann dýrasti Ferrari 620 Scagilietti kostar yvir seks milliónir á donskum nummarplátum.

Hóast fíggjarliga afturgongd í Evropa roknar Formula Automobile við at selja umleið 30 nýggjar Ferrari í Danmark í 2009.

**mg**





*Ferrari Scagilietti*